

www.oljan.fo

**Jan Müller** 10 - 10 - 2012

# Maersk hava 50.000 tunnur um dagin úr Sverdrup

Í sambandi við at A.P. Møller-Mærsk hevur sett sær sum mál at økja sína oljuframleiðslu upp í 400.000 tunnur um dagin í 2020, hevur Maersk Oil sett tal á, hvussu nógv ætlanin er at fáa burtur úr teimum einstøku leiðunum. Millum tær stóru leiðirnar er Johan Sverdrup-leiðin, sum er í norskum øki. Eftir ætlanini skal framleiðslan har byrja í 2018, og málið hjá Maersk Oil er at fáa 50.000 tunnur um dagin haðani um dagin. Maersk Oil hevur funnið olju í Chissonga-leiðini í Angola. Felagið hevur ikki sett nakað tal á, hvat tað væntar at fáa burtur úr henni, men sigur, at Chissonga og Johan Sverdrup skulu geva umleið 100.000 tunnur um dagin tilsamans. Framleiðslan á Chissonga-leiðini byrjar í 2017 ella 2018. Maersk Oil roknar við at fáa millum 8.000 og 15.000 tunnur um dagin frá Elly-Luke-leiðini og millum 20.000 og 45.000 tunnur frá Culzean aftan á 2017. Loksins hevur Maersk Oil vónir um at fáa væl burtur úr Buckskin-leiðini í USA. Felagið sigur hetta vera eina spennandi verkætlan, men hevur ikki sett nakað tal á hana enn. Gongst sum ætlað, kemur tann fyrsta oljan haðani í 2019, sigur Maersk oil.

